# P/F Jógvan Weihe nýggjan bygning

**Um árskiftið flytir handilsfyritøkan P/F Jógvan Weihe í nýggj hølir við Stiðjagøtu í Havn. Jógvan Weihe hevur arbeitt sum sølumaður og selt vørur í 40 ár. Hann byrjaði sum sølumaður hjá Landshandlinum í 1963**



*Nýggi bygningurin hjá P/F Jógvan Weihe verður liðugur til árskiftið*

HANDIL
*Magnus Gunnarsson*

Handilsfyritøkan P/F Jógvan Weihe í Havn bleiv stovnað í 1991. Hetta var í ringastu tíð, meðan samfelagskreppan herjaði. Tað vóru tey bæði Hildubjørg og Jógvan Weihe sum stovnaðu fyritøkuna.

Jógvan, ið er útbúgvin skrivstovumaður, byrjaði sum sølumaður hjá Landshandlinum í Havn í 1963, har hann arbeiddi sum ferðandi sølumaður. Seinni arbeiddi hann sum sølumaður á heilsøluni hjá Kartni Winther.

Í 1991 byrjaði Jógvan saman við konuni, Hildubjørg, við eini heilsølu heima hjá teimum sjálvum, Undir Heygnum 39 í Havn. Í 1994 flutti fyritøkan í leigaði hølir við Staravegin. Tey útvega so gott sum allar vørur, men tað er í høvuðsheitum fóður og fiskireiðskapur tey selja.

Um árskiftið flytur fyritøkan inn í nýggjan bygning á Stiðjagøtu. Nýggi bygningurin verður 900 fermetrar, har ein partur er í tveimum hæddum, har verður bæði heil- og smásøla.

maggi@sosialurin.fo

## Sjónleikaraskeið í rødd, rørslu og teksti

**Vikuskiftið 5. -7. september 2003 skipar MáF fyri sjónleikaraskeiði í Tórshavn**

SKEIÐ
*Tíðindaskriv frá MáF*

Skeiðið er ætlað sjónleikarum yvir 18 ár.

Undirvíst verður út frá arbeiðshátti, sum enska sjónleikarakvinnan Nadine George er komin fram til, eftir í 35 ár at hava granska í samskiftinum millum rødd, kropp og medvit. Nadine George hevur verið í Føroyum og undirvíst sjónleikarum í Leikarafelag Føroya, og hava føroyskir sjónleikarar eisini luttikið á skeiðum hjá Nadine George í London.

Spælir tú sjónleik, er neyðugt at hava eina rødd, sum hoyrist, og sum er áhugaverd at lurta eftir, eisini er neyðugt at kroppurin er ein aktivur partur í frá-søgnini.

Øll hava vit eina rødd, men tey flestu av okkum hava ikki hóming av, hvørja kraft og eginleikar hon rúmar. Á hesum skeiðnum verður arbeitt við at sam eina rødd, kropp og medvit. Arbeiðshátturin er sera einfaldur, spennandi og stuttligur. Arbeitt verður við leikbrotum úr Macbeth hjá William Shakespeare.

Umframt at undirvísa sjónleikarum í hesum arbeiðshátti, hevur Nadine George eisini undirvíst fólki, sum brúka sína rødd og kropp nógv í arbeiðnum, t.d. lærarum, útvarps- og sjónvarpsfólki.

Skeiði byrjar fríggjakvøldið 5. september kl. 19 og endar sunnukvøldið 7. september kl. 17.

Lærari er Egi Dam sjónleikari úr Leikarafelag Føroya.

Pláss er fyri 12 luttakarum. Tilmeldan á skrivstovuni hjá MáF, tlf. 315624, 315688 ella á maf@maf.fo í seinasta lagi 26. august 2003.

## »MIF top run«

**Mjørkadals ítróttarfelag skipar fyri MIF TOP RUN motiónsrenning**

ÍTRÓTT
*Tíðindaskriv*

Mjørkadals Ítróttarfelag (MÍF) skipar fyri motiónsrenningini MIF TOP RUN 6. septembur 2003, kl. 15.00.

Renningin byrjar við Statoilstøðina í Kollfjarðardali og endar á Sornfelli, eitt strekkið uppá 9,8 km. Øll eru vælkomin at luttaka, tó skal man vera varugur við at túrurin er móti brekku - allan vegin!

Kostnaðurin fyri at luttaka er kr. 50,00 við online-tilmelding á www.mjorkadal.com. Tað er eisini møguligt at eftirtilmelda seg frá kl 14.00 til kl. 14.50, har renningin byrjar. Kostnaðurin við eftirtilmelding er kr. 75,00. Trý tey fyrstu sum koma á mál fáa tillutað heiðursmerki. Skjótasta rennarin fær eisini eitt par av Mizuno renniskóm frá Sohvel Sport. Harafturat verður lutakast millum tey sum gjøgnumføra um góðar vinningar frá Fragd & Fimi, HD.fo og Sohvel Sport, soleiðis at øll hava møguleika at fáa ein vinning við sær heim.

Tann uml. 4 km langi fjallvegurin millum Oyggjarvegin og Sornfelli verður stongdur fyri almennari ferðslu millum 14.00 - 17.00.

Allir luttakararnir sum gjøgnumføra fáa eitt diplom sent eftir renningina.

Meira kann lesast um renningina á www.mjorkadal.com.

## Dupult moralur og húklarí føroyinga

**Hans Birgir Hansen**

Dupultmoralur og húklarí føroyinga er ikki bert galdandi politikkarar, men føroyingar í síni heild ið ikki liva og virka í nattúrligum, normalum, menniskjaligum, moralskum, etiskum nærumhvørvi!

Tað kemst av tí at føroyingar eru komin ovlangt avsíðis frá áðurnevndu fyribrigdum, og við fremmandari heiladálkan, vaskan, indoktrineran, av sinnalagi frá børnum til fólkapensjónistar í dag!

Tað hevði sømt seg øllum føroyingum at slept øllum dupultmorali og húklarí ið ikki er nøkrum til sóma í dag, og at liva dupultar lívstilverur við at hava hjámakar við síðuna av tí ein hevur í dag!

Tað hevði tá verið frægari at havt ein hugburð hvat ein er fyri og ímóti og hvønn politikk ið ein vil reka og byggja sína støðutakan á, fyri mítt viðkomandi byggir ein á, áðurnevndu fyribrigdir ídag! Øll eiga eisini at gevast við øllum hjúklanum og sleikjanum fyri teim ráðandi ið skulu læra at standa á egnum beinum eins og føroyingar í síni heild, duga øll at skilja tað ið lesa føroysku bløðini!

Tað eru somuleiðis føroyingar í síni heild í bedraga og snýta onnur við at vera óheiðurlig og óreiðilig við atliti til peningavið-urskiftir og við at vera óseriøs og ómotivera við at lata sum einki!

Nógvir føroyingar eru í síni heild ikki tað hvørt konufólki, mannfólki geva seg út fyri at vera í tí dagliga gerandislívi tá ið ein kennir muruna í øllum teim ið ein dagliga stríðist við her í Havnini!

Eg havi fingið at sæð hvat ring samvitska førir við sær hesi seinastu mongu árini og hvørs alt ikki spælir so væl av hjá øllum í bukka undir av stórum trýsti í fekk fleiri at beina fyri sær í Havn. Eg havi inside vitan, forstáilsi, tilvitan um mannakroppin og dagliga mannalívið, ið ein greiðir frá í túsundtals lesarabrøvum, aftan á lestna og gransking og royndir av tí ein hevur uppliva!

Eg havi áður í túsundtals lesarabrøvum í føroyskum bløðum viðgjørt øll daglig fyribrigdir í eyðkenna øll ættarlið av føroyingum, ið dagliga ampa, sjenera, provokera ein, dag og kvøld í Havnini!

Eg havi fingið avbygdar, býarfólki, at avdúka seg persónliga í tí dagliga gerandislívi og sýna mær teirra býttleika og svakligheit og onnur daglig fyribrigdir, ið ein viðger í nógvu lesarabrøvunum!

Eg skal framhaldandi klæða øll úr inn at kropp og sál ið ikki eru á røttu síðuni hvat ið Lóg & Rætt & Landaskil & Politiviðtøku fyri Tórshavn & Ferðslulóg & Rúsdrekkalóg við fleiri viðvíkur ídag!

So óheft/heft at øllum felagsskapum & klubbum & trúarsamkomum finna vit ættarlið við eyðkenni dupultmorali & húklarí føroyinga & innan fyri øll tey væl etableraðu harkaliðini í Føroyum!

Tað vil siga øll í fáa av grovfíluni frá mær í øllum tí dagliga kjaki og í lesarabrøvum í føroyskum bløðum í fáa fólk at vakna úr sínum søta »Tórnurósudreymi« kring landið og í Havnini dagliga!

# ítróttur

Nr. 156 • hósdagur • 21. august 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo



*Martin Simonsen stendur klárur at taka ímóti servuni hjá Jón Brekku. Martin vann finaluna í Niels L. Arge Open, og hann gjørdist eisini føroyameistari*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Martin føroyameistari í tennis

**Martin Simonsen er nýggjur føroyameistari í tennis. Hann vann týsdagin á Jón Brekku í finaluni**

TENNIS
*Stefan í Skorini*

Tað er ofta langt ímillum, at nakað fræuttist frá tennisítróttini her á landi. Men seinastu dagarnar hevur tenniskappingin Niels L. Arge Open verið spæld á vallunum í Gundadali. Hetta var samstundis skipað sum ein FM-kapping.

FM varð annars hildin fyri ólavsøku, men av tí at danin Scot Christensen vann kappingina ta ferðina, mátti nýggju føroyameistari finnast. ÍSF hevur nevniliga ta reglu, at um tú ikki hevur búð í Føroyum í tvey samanhangandi ár, kanst tú ikki gerast føroyameistari.

### Martin vann sannførandi

Fyrstu dystirnir í Niels L. Arge Cup vórðu spældir hósdagin, og týsdagin varð komið fram til finaluna.

Tað vóru teir báðir Martin Simonsen og Jón Brekku, sum høvdu spælt seg í finaluna, og Martin dró longra stráið í tí dystinum. Teir báðir hava spælt tennis í nógv ár og hava fleiri ferðir verið við á Oyggjaleikunum.Martin vann á Kristin Jensen í hálvfinaluni, og Jón basti Hjalta M. Joensen í næstseinasta dystinum.

Martin var undan kappingini styrkismettur sum nummar eitt og Jón nummar tvey. Tí var tað júst eftir bókini, at hesir báðir komu í finaluna. Martin vann dystin 2-0 við settúrslitunum 6-2 og 6-1.

Á pappírinum er hetta ein tryggur sigur, men dysturin var nógv drúgvari enn úrslitið kundi bent á. Fitt var av vindi, og tí var torført hjá leikarunum at spæla, men spenningur var allatíðina í dystinum.

Nýggjur almennur FM-vinnari í tennis er sostatt Martin Simonsen, og hann fekk steyp og 5.000 krónur frá Niels L. Arge.

Í næstum verða kappingarnar hjá U14 og U18 hjá dreingjum og kvinnum leiktar.



*Jón Brekkur sendir eina forhond avstað. Hann mátti lúta í finaluni týsdagin*
*Mynd: Álvur Haralsen*



*Teir báðir finalistar, Jón vinstrumegin og Martin høgrumegin, avmyndaðir við steypum eftir dystin*

## Kappsigling á Skálafjørðinum

**Sunnudagin skipaði Lions Clup Eysturoy fyri kappsigling á Skálafjørðinum**

SIGLING
*Tíðindaskriv*

31 bátar høvdu melda til kappsiglingina, og av teimum startaðu teir 30. Líkindini at sigla vóru ikki av teim bestu bert eini 3-5 sek/m av landsynningi eystri við nøkunlunda jøvnum vindi inn um Saltnes, men síðani lá hann ójavnur longri inni á fjørðinum.

Hetta gjørdi at menn máttu sigla uppaftur, summir enntá fleiri ferð, fyri at koma nóg langt eystur fyri at koma inn um málboyurnar. Her fingu menn rættiliga roynt seg at skáksigla. 25 bátar komu um mál, meðan fimm góvu skarvin yvir.

### Tríggir tímar

Tað tók umleið tríggjar tímar frá tí at byrjað var útfyri vitanum á Nesi, til tann seinasti báturin fór um mál.

Aftná varð sum vant bjóða siglarunum kaffi og pannukøkur í matarhøllini á Fiskavirking í Runavík, har steypini eisini blivu handað.

Tríggir teir fyrstu, s/b Hoyvíksbáturin og s/b Leivur, fingu steyp til ognar. Harumframt fekk nr. 1 s/b Búgvin ferðasteyp í varðveitslu.

Hetta var samstundis seinasta kappsiglingin í ár, og nýtir áhugafelagið »Seglið« hesa sum eitt slag av »finalu« og handaðu teir fleiri steyp í hesum sambandi, sum teir uttan iva koma at greiða nærri frá.

Lions Club Eysturoy takkar hjartaliga øllum luttakarunum fyri áhugan og ynskir øllum blíðan byr.

Úrslitið av kappsiglingini á Skálafirði 17. august 2003, sum Lions Club Eysturoy skipaði fyri var hetta:

| Á mál sum | Bátanavn | Bátaeigari |
|---|---|---|
| nr. 1 | s/b Búgvin | Per Mikkelsen, Strendur |
| nr. 2 | s/b Hoyvíksbáturin | Egil Simonsen, Hoyvík |
| nr. 3 | s/b Leivur | Bjarni Petersen, Kollafjørð |
| nr. 4 | s/b Nón | Agnar Olsen, Hósvík |
| nr. 5 | s/b Miðgerð | Emil Petersen, Kollafjørð |
| nr. 6 | s/b Vinur | Óli Mikkelsen, Tórshavn |
| nr. 7 | s/b Malli | Oddmar Joensen, Kollafj. |
| nr. 8 | s/b Gurið | Jón Rasmussen, Saltangará |
| nr. 9 | s/b Eyð | Atli Leitisstein, Runavík |
| nr. 10 | s/b Ternan | Kári Borgarklett, Hósvík |
| nr. 11 | s/b Falkurin | Kári Hansen, Strendur |
| nr. 12 | s/b Olivia | Jóan J. Andreassen, Kollafj. |
| nr. 13 | s/b Kollsteinur | Mikkjal Hansen, Hósvík |
| nr. 14 | s/b Jensabátur | Tormund Hansen, Nólsoy |
| nr. 15 | s/b Byrgishamar | Magnus Fr. Petersen, Kollafj. |
| nr. 16 | s/b Eyðbjørg | Sámal Petur Lervig, Skála |
| nr. 17 | s/b Svanur | John Mikkelsen, Skála |
| nr. 18 | s/b Báran | Haraldur Kjeld, Saltnes |
| nr. 19 | s/b Sildin | Jónsvein Mikkelsen, Toftir |
| nr. 20 | s/b Mia | Bárur Nielsen, Saltangará |
| nr. 21 | s/b Niels í Nesinum | Alfred Gullbein,Tórshanv |
| nr. 22 | s/b Dúgvan | Rodmund Nielsen, Glyvrar |
| nr. 23 | s/b Helga | Kaj Johannesen, Kaldbak |
| nr. 24 | s/b Gjáarbáturin | Janus Petersen, Kollafjørð |
| nr. 25 | s/b Góðadalsbáturin | Jonhard á Marknagarði, Saltangará |